INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Løgmansskrivstovan

- 4. SEP. 2013

I. nr.: 1014-005/13

KC 11/15

Løgmansskrivstovan
Tinganes Postrúm 64
100 Tórshavn

4. september 2013
Mál: 13/00373-85
Tygara skriv:
Málsviðgerð:

Tann 27. august 2013 bar Dagur og Vika tíðindi um, at Innlendismálaráðið ikki hevði latið Løgtinginum týðandi upplýsingar í einum innanhýsis uppriti frá deildarstjórunum í Innlendismálaráðnum í sambandi við málið um Eysturoyartunnilin.

Í tí sambandinum heitti Løgmansskrivstovan tann 28. august 2013 á Innlendismálaráðið, um at koma við eini frágreiðing um málið um innanhýsis viðgerðina og upprit um sama. Innlendismálaráðið svaraði sama dag áheitanini og lat Løgmansskrivstovuni frágreiðing um málið. Frágreiðingin er hjáløgd.

Í Innlendismálaráðnum er sum partur av innanhýsis málsviðgerðini vanlig mannagongd at hoyra viðkomandi deildir í ráðnum, tá ið lógaruppskot verða gjørd.

Hetta var eisini gjørt í hesum máli, og deildirnar fingu lógaruppskotið; men ikki sáttmálan, til viðmerkingar.

Embætisfólkini, sum arbeiddu við lógaruppskotinum, viðgjørdu spurningarnar frá deildunum og mettu, at spurningarnir vóru góð hjálp til at tryggja sær at lagt var upp fyri týdningarmiklum og prinsippiellum viðurskiftum.

Tær lógarteknisku viðmerkingarnar frá løgdeildini vórðu tiknar til eftirtektar, og løgdeildin setti lógaruppskotið upp sambært vanligum reglum.

Ikki er vanligt, at viðmerkingar frá deildunum eru partur av lógaruppskoti, sum verður lagt fyri Løgtingið, tí tað er skrivað við innanhýsis málsviðgerð fyri eygað.

Samanumtikið eru nógvar av viðmerkingunum og spurningunum viðmerkingar og spurningar til greinir í galdandi lóg, sum ikki eru partur av lógaruppskotinum. Svar upp á fleiri av hesum spurningum er at finna í lógaruppskotinum til galdandi lóg, løgtingsmál nr. 161/2009. Eisini eru nakrir spurningar og viðmerkingar til tílíkt, ið verður mett at hoyra heima í einum sáttmála heldur enn eini lóg. Nevnast skal eisini, at í nøkrum førum verður spurt eftir slíkum, sum kortini stendur í lógartekstinum ella viðmerkingunum í lógaruppskotinum.

Víst verður í hesum sambandi til hjálagda skjal, har viðmerkingar eru gjørdar til teir einstøku spurningarnar, sum deildirnar hava reist.

Út frá hesum má staðfestast, at talan ikki er um týðandi upplýsingar av slíkum slagi, sum áttu at verið lagdar fyri Løgtingið.

Rúni Joensen
aðalstjóri